## DAGSINS MEINING

# Fiskivinna, aling og olja

Hetta er heitið á eykablað, sum Sosialurin gevur út í dag. Blaðið, ið er uppá 56 síður, verður m.a. gjørt í sambandi við, at Oljuvinnufelagið skipar fyri oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum. Vit hava í sama viðfangi valt at hyggja nærri at teim báðum verandi og mest týðandi vinnunum í Føroyum, fiskivinnuni og alivinnuni.

Hóast hesar vinnur sum so ikki hava nakað beinleiðis við hvørja aðra at gera, eru tær tó saman sjálvur ryggurin í okkara búskapi. Fyrst og fremst fiskivinnan á sjógvi og á landi, síðani alingin, sum – hóast sínar barna/byrjunarsjúkur – stendur fyri týðandi parti av samfelagsinntjeningini. Aftrat hesum báðum kemur so oljuvinnan, ið ætlandi verður eitt nýtt búskaparligt bein hjá samfelagnum at standa á. Vit síggja longu nakað av virksemi men mugu tó vísa tol, til fleiri brunnar eru boraðir. Sambart nýggjum korti, sum Sosialurin hevur latið gera í samstarvi við Statoil, verða tað boraðir ikki færri enn 11 kanningarbrunnar í føroyskum og bretskum øki komandi árini. Hetta er ikki so lítið, tá hugsað verður um, at talan er um eitt nýtt øki. Á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum fara fyristøðufeløgini at greiða frá, hvar vit/tey standa í oljuleitingini. Og kunnu vit rokna við, at tey fara at biðja føroyingar hava tol, tí oljuleiting er ein langtíðartiltongd.

Av serligum áhuga er eisini samrøða við kanadiskan granskara. Nú fiskastovnar minka og hvørva standa fiskimenn og fiskifrøðingar og havfrøðingar spyrjandi. Fiskimenn siga, at tað er náttúran, sum skapar góðar og ringar árgangir og harvið góðan og ringan fiskiskap. Fiskifrøðingar og aðrir granskarar siga, at hetta er ikki so einfalt. Ovurveiða hevur stóra ávirkan á stovnarnar, men tað hava broytingar í havumhvørvinum eisini. Fyri at skilja hesi viðurskifti betri verður roynt at byggja upp modell, sum kann siga, hvussu eitt nú veður og vindur eina staðni á klótuni kann ávirka gróður og framleiðslu eitt annað stað osfr.

Allastaðni leita granskararnir eftir svarum fyri harvið at vita, hvussu tann besta stovnsrøktin skal skipast. Torført er at finna slík svar á teim stóru høvunum, og tí seta vísindamenn nú kikaran á tað lítla Føroyaøkið, sum er ein lukkað skipan. Ber til við at granska hesa lítlu men sera livandi vistskipan at finna svar uppá nógvar av ivaspurningunum, so kann henda vitan brúkast í altjóða høpi. Tað kann uppá longri sikt vera við til at skapa størri forstáilsi millum vinnu, gransking og myndugleikar, soleiðis at vit neyvari vita, hvussu nógv kann veiðast, nær ringir árgangir eru á veg orsakað av broytingum í havumhvørvinum osfr.

Føroyaøkið er at meta sum ein lítil rannsóknarstova og kunnu vit fáa serkøn aðrastaðni frá at arbeiða saman við okkara granskarum, ber kanska skjótari til at finna út av, hvussu tingini hanga saman. Og tað vil hava við sær betri ráðgeving.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Nær er sjónleikur list og nær er sjónleikur politisk list ella demagogi?

**Regin Eikhólm**



At sjónleikur sum list kann kveikja hugin og vísa á gongdar leiðir í annars torrgongdum og tabuløgdum loynistíggjum, eru teir tveir seinastu sjónleikirnir hjá Grímu: Ginusøgur og List gevandi dømir um, og sum vit øll kunnu læra nógv av.

**Ginusøgu leikurin**
Kontroversielli Ginusøgu sjónleikurin - leiktur av trimum ginuumboðum - hevur gingið fyri fullum húsi bæði í Havn, Fuglafirði, Skopun og annars runt um í Føroyum. Áður tabulagdi ginu-sfæru-existensurin verður í vælleikta leikinum bevístgjørdur í hugaheimi áskoðarans, sum fær innlit og harvið møguleika fyri at kunnu virka aktivt og frælst í egnari óheftari støðutakan innan økið.

*"Ein kensla, sum er ein passiv støða, heldur uppat at vera ein passiv støða, so skjótt sum vit gera okkum eina týðiliga idé ella hugmynd um hana,"* (Spinoza í Ethica 1677), ella við øðrum orðum so er reelt innlit ein forteyt fyri frælsi á økinum.

Í gomlum døgum vóru ginuumboð brend á báli, um tær tordu at gera vart við seg, men hesaferð vóru tað tær, sum festu í okkum. *Kært barn har mange navne,* og Ginusøgurnar eru onki undantak í so máta. Ikki færri enn 41 systirnøvn hava tær funnið til ginu, og helst verður okkurt teirra at finna í næst útgávuni av orðabókini. Hetta er eisini kærkomið, tí føroyska orðabókin frá 1998 er sera kørg á økinum. Á síðu 891 stendur enntá tað hjá kvinnu og manni at hava samanfallandi navn.

**Leikurin List**
Leikurin List er annarleiðis. Har er tað ein uppgerð millum tríggjar vinmenn um ein hvítan málning, sum ein teirra hevur ognað sær fyri ein sera høgan prís. Teirra ymiska fatan av málninginum og hvat list er, setir teirra gamla vinarlag uppá ein harðan prøva. Uppgerðin teirra millum er bersøgun og inniheldur alt frá eirindarleysari egoistiskari sjálvsuppfatan til eltibløðru samleika, sum verður meistarliga væl lýst av teimum trimum mannligu leikarunum. Flestu okkara munnu kenna seg aftur í onkrum av tí sum fer fram á pallinum, og helst fylgir einhvør hugfrøðislig spegilsmynd við okkum heim.

Í einum leikbroti verður beinraki sagt, at: *"Vit vita øll, at list er ikki sannleiki. Listin er ein lygn, sum fær okkum at fata sannleikan, í øllum førum tann sannleikan vit hava møguleika til at skilja."* (Pablo Picasso).

Hetta er ikki meint sum nakað ummæli, men heldur ein roynd at vísa á at omanfyri nevndu sjónleikir sum list eru mennandi fyri okkara dialektisku sjálvsuppfatan og gevur áræði til meiri sjálvstøðugt og tilvitandi at taka støðu í lívsins ymisku viðurskiftum. Sjónleikur sum list stimbrar og uppbyggir, meðan sjónleikur sum politisk list ella demagogi niðurbrýtur og einsrættar.

**Sjónleikur sum politisk list ella demagogi**
Síðani 1998 hevur ein einsmansleikur við eyðsýndari politiskari list ella demagogi verið spældur á okkara heimliga politiska palli.

Hesin politiski einmansleikur tekur støði í tí stagneraðu og einføldu uppfatanini av uppgerðini millum Føroyar og Danmark í tíðini beint eftir seinna heimsbardaga. Í leikinum skulu Føroyar strax loysa frá Danmark, og stovna sítt egna fría, frælsa, óhefta, uttanveltaða, neutrala, solidariska, autonoma og fríða Frælsisríki Føroyar. Við hjálp av liviligum útjaðarastuðuli, øktum effektiviteti og kanska olju skal ríkið vera sjálvfiggjandi, og allir føroyingar skulu fáa eitt betri og virðiliga lív.

Men ein myta er sum sigur, at ein sambandsdreki liggur og bølir yvir frælsisskattinum á gáttina inn í Frælsisríkið og forðar fyri tí nýggja ríkinum. Varaløgmaður var tann fyrsti til ítøkiliga at gera eina roynd at vísa á sambandsdrekan, tá hann skrivaði bókina: "Myten om rigsfællesskabet" (2000).

Í síni ótroyttuligu roynd at gera av við sambandsdrekan eydnaðist tað umsíðir varaløgmanni at særa drekan, men onki frælsisgull varð funnið. Tað vísti seg seinni, at mytan um sambandsdrekan var ein hvørvisjón, sum varaløgmaður hevði havt, tá hann sá vælferð Føroya fólks í drekahami.

**Intentión og veruleiki**
Samanbera vit intentiónirnar í politiska einmansleikinum frá 1998 við veruleikan, so er stórur munur á. Leikurin skuldi eftir ætlan geva eitt stórt yvirskot (frælsisgullið), men frá 1. januar 2002 hevur leikurin givið eitt árligt hall uppá 366 mill. krónur, sum Føroya fólk nú skal gjalda. Hetta er ein stór byrða at leggja á Føroya fólk minni enn 10 ár eftir at landi fíggjarliga kollsilgdi, og enn hevur multipla milliardalánið hangandi yvir sær, alt meðan varaløgmaður dusar sær við fastfrystu restini av blokkinum hjá "særda sambandsdrekanum", 600 mill. krónur árliga.

Tær 366 mill. krónur, sum varaløgmaður lat bløða burtur, høvdu annars verið hentar nú fíggjarlógin 2003 er fyri, og fíggjartrot er á bæði einum og øðrum. Henda upphædd hevði eisini rokkið til ein nýggjan Smyril ella eina norðoyar tunnil hvørt ár ella fyri tað eitt nútímans vælútgjørt sjúkrahús. Og nú hava vit ikki ráð at keypa innmat fyri 50 mill. krónur til nýggja sjúkarhúsið í Havn, sum helst kemur at standa tómt í áravís.

**Politiskur effektivitetur**
Hóast lyklarorðið í politiska leikinum er effektivitetur, so eru útreiðslurnar til almennu fyrisitingina síðani 1998 meir enn tvífaldaðar. Samanbera vit Løgtings- og Landsstýrismanning við tilsvarandi í Danmark eftir fólkatalinum, ( Danmark hevur um 100 ferðir fleiri fólk enn vit ), so er heldur ikki nógv at heinta har í effektiviteti. Okkara 32 løgtingslimir svara til, at Fólkatingið skuldi havt 3.200 limir, men tað klárar seg við 179 limum. Okkara landsstýri hevur 9 limir, og tað hevði

*Framhald á síðu 9*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Hví ikki lesa tað, sum skrivað stendur?

**Jóannes Eidesgaard**
*formand for Javnaðarflokkin (Socialdemokratiet)*



Blaðmaðurin Ingolf S. Olsen á Dimmalætting og sjálvandi Sjúrður Skaale, skrivari á Christiansborg vilja báðir vera við, at blaðgrein mín í Grønlandspostinum í gjár er ein beinleiðis uppílegging í grønlendska valið. Sjónvarpsmaðurin John Johannesen vildi hin vegin hava tað til, at eg vildi steðga sjálvstýristilgongdini í Grønlandi.

Til tess at føroyski lesarin sjálvur kann lesa, hvat greinin snúði seg um, verður greinin endurprentað her.

**Grønlandsk politik ved en milepæl**
**Der er noget, der tyder på. at selvstændighedsspørgsmålet i Grønland vil komme til at spille en ret så stor rolle ved det forestående grønlandske landstingsvalg. Derfor bør man i Grønland lære af de fejl, som færøsk selvstændighedspolitik begik, da man på Færøerne gjorde dette meget væsentlige spørgsmål til en sag for de få i stedet for at gøre det til en sag for hele folket.**

Uden at blande mig i den grønlandske valgkamp og i det grønlandske landstingsvalg, så føler jeg dog behov for at udtrykke min mening om, hvordan et så væsentligt spørgsmål som selvstændighed, bør behandles. Og her tænker jeg specielt på, at man ikke begår de samme fejl, som færøsk selvstændighedspolitik har været udsat for siden 1998. Så mine bemærkninger bunder alene i et ønske om, at man i Grønland kommer bedre fra start, end vi gjorde på Færøerne.

På Færøerne gjorde koalitionen og specielt de to partier Republikanerne og Folkeflokken selvstændighed til en sag for netop deres vælgere og netop deres partier. Man baserede politikken på det smallest mulige flertal i Lagtinget. Man glemte simpelthen at tage hensyn til, at andre borgere på Færøerne og andre partier på Færøerne måske havde en anden opfattelse, selv om man samtidig kunne konstatere, at samtlige partier var indstillet på at opnå større selvstændighed. Konsensus lå lige om hjørnet. Men desværre viste landsstyret i bund og grund en meget ringe forståelse for demokratiets fundamentale værdier.

Man havde nemlig god mulighed for at finde konsenses, men man ønskede ikke andre aktører. Man definerede selvstændigheden som landsstyrets egen, og man ønskede at eje den alene. Man gjorde selvstændighedsspørgsmålet til et partispørgsmål og et koalitonsspørgsmål. Man blev forfængelig og ville alene tage æren for de resultater, der måtte opnås. Ja, man blev så forfængelig, at man fra begyndelsen satte kursen mod den totale løsrivelse allerede efter tre år, hvor man, så paradoksalt det end må lyde, ønskede den danske stat til at fortsætte med bloktilskuddet i mindst 15 år.

Men man havde gjort regning uden vært. Flertallet af færingerne følte sig utrygge ved udviklingen, og den danske regering var slet ikke indstillet på at financiere løsrivelsen med en så lang overgangstid.

Pludselig bebuder landsstyret en folkeafstemning om selve processen, men aflyser den senere, da man ser, at vælgerne går imod landsstyret.

Det er meget vigtigt i denne forbindelse at notere sig, at selvstændighed ikke er et resultat af et enkelt partis program, men som resultatet af en udvikling med bred opbakning. Man opnår først resultat i enhver politisk handling, når denne har folkets opbakning, men specielt vigtigt er det, når det gælder et så stort spørgsmål som selvstændighed.

Hvis ikke folket er med, kan det let ende med en forsinket udvikling. Med andre ord, en for ambitiøs og urealistisk handlingsplan kan let ende med, at man mere skader sagen end gavner den.

Hvorfor mon Sambandspartiet, som er mest tilbageholdende i selvstændighedsspørgsmålet, er det største parti på Færøerne i dag? Det skyldes alene det faktum, at den færøske vælger ikke føler sig tryg med landsstyrets planer. Man har udløst en fuldstændig unødvendig reaktion, fordi man kørte sagen frem med et meget spinkelt flertal i Lagtinget. Og man forsøgte at forcere udviklingen.

Og man bør også notere sig, at det ikke de yderste fløjer, i vores tilfælde Republikanerne og Sambandspartiet, der kan løse sagen. Det er jo de samme partier, der overlever på, at sagen aldrig bliver løst. Faktisk er de begge på hver sin måde medvirkende til, at der slet ikke sker noget. Den ene part, fordi de ønsker tingene at ske for hurtigt, og de andre, fordi de slet ikke ønsker, at for meget skal ske. De holder hinanden i live.

Derfor må konsensus findes, og dens substans er de holdninger som midterpartierne i selvstændighedsspørgsmålet står for.

Derfor bør man i Grønland lære af de fejltrin, som er sket i færøsk selvstændighedpolitik. Den må ikke blive en sag for de få, for enkelte partier, eller hvad værre er som en platform, hvor enkelte politikere kan sikre egen politisk eksistens. Selvstændighed må ikke blive et levebrød.

Sagen er langt mere alvorlig. Derfor er vejen frem konsensus. Det kan godt være, at processen derved tager længere tid, men den er sikker, og den har fremdrift. Og faktisk er det den eneste vej.

Derfor skal det være mit ønske for den grønlandske selvstændighed, at den skal bygge på en bred folkelig opbakning. En konsensuspolitik, så er udviklingen sat på skinnere.

Med ønsket om et godt valg.

*Framhald av síðu 8*

svarað til at danska stjórnin skuldi havt 900 ministarar, men hon hevur vanliga um 20 limir, og í útjaðarøkinum brenna vit framvegis ullina uttan umhvørvisgóðkent roykfiltur!!!!

**Nationalromantisk surrealisma í postkommunistiskum regi**
Sum tema umboðar politiski einmansleikurin eitt slag av "nationalromantiskari surrealismu í postkommunistiskum regi", ið annars mest er at síggja í tilafturskomnum londum. Mann kann so spyrja, hvat fyri slag av frælsi ein slíkur leikur kann bjóða føroyingum, eftir at kommunisman sum stjórnarskipan hevur vísti seg at vera ein frælsistáta? Eisini havandi í huga tað ignoranto atferð ella strutsaframferð sum verður sýnd tí miðsavnandi frælsisrørslu, sum hevur tikið seg upp í Europa síðani seinna heimsbardaga, og hevur útklakt bæði NATO og EU.

Eitt isolerað mini ríki er eitt anakronistiskt fyribrigdi í dag, nú felags samexistensur og globalisering eru vorðin ein partur av okkara samleika. Uttan neyvt samstarv og fíggjarligt atlit skal meira til enn ein fjepparaskarði av skúlaungdómi og litterert loysingarhugaðum verbalekvilibristum, til at geva Føroya fólki størri per-sónligt frælsi og vælferð enn tað vit hava.

Kanska er hetta eitt tema fyri Grímu at taka upp til næsta vetur, tá virkningurin eftir Ginusøgurnar hevur lagt seg.

Eftir er bert at vóna at Føroya fólk nú hevur fingið politiskan sjónleik fyri alla pengarnar, tí sjálvt eftir leiklok verður gjaldið fyri henda politiska einmansleikin framhaldandi 366 mill. krónur um árið umframt tær ætlaðu hundraðtals yvirtøkumilliónurnar.

Latið tey í Grímu um at spæla sjónleik, tí tað eru tey góð til. Okkara fólkavaldu landspolitikarar áttu heldur at koncentrerað seg um at føra ein savnandi politik, sum ikki í misskiltari loysingarhugmóð undirgravar tað samhaldsfasta í føroyska samfelagnum, har virðiligt pláss og vælferð eigur at vera til okkum øllum.

# Vónandi hevur tú etið bláseym, Jóannes

**Høgni Hoydal**



**Formaður javnaðarfloksins er helst fyrsti framstandandi politikari í eini ófrælsari tjóð, sum nú alment ávarar eina aðra ófrælsa tjóð ímóti at velja frælsisleiðina. Beint upp undir eitt avgerandi val hjá grønlendsku tjóðini. Men vónandi er talan um eitt mistak. Og vónandi verður hann tann einasti og seinasti, ið hevur gjørt hetta.**

Góði Jóannes.

Veit ikki, um eg skal gráta ella flenna.

Havi framvegis havt ta vón, at tú hóast alt meinti okkurt av tí sjálvstýrisprátinum, sum tú borðreiddi við fyri bert 4-5 árum síðani. At tú bert var vorðin fangaður í tí sambandska partinum av baklandinum hjá javnaðarflokkinum. Men at tú einaferð fór at bróta ígjøgnum.

Nú vóni eg, at tú hevur etið bláseym. Ella at onkur hevur spælt tær eitt puss. Ella at í hvussu er onkur logisk frágreiðing finst, sum kann prógva, at hetta er ikki tilvitað ella ætlað frá tíni síðu.

**Hvat høvdu onnur sagt?**
Tí sjálvandi kann tað ikki passa, at formaðurin í Føroya Javnaðarflokki hevur lagt seg út í grønlendska valstríðið og ávarað ímóti at velja loysingarflokkarnar.

Hvat høvdu Mórentius Viðstein, Danbjørg, P.M. Dam og aðrir hugsjónarmenn sagt, um teir høvdu vitað?

Hvat høvdu hugsjónarfólk innan arbeiðararørsluna kring allan heim sagt, um hetta kom út?

At ein framstandandi politikari úr eini ófrælsari tjóð, ávarar eina aðra ófrælsa tjóð ímóti at velja frælsisleiðina - á kanska tí mest avgerandi vali nakrantíð?

At ein javnaðarpolitikari hevur so lítið álit á brøðrafólkinum, at tað má "ávarast" um síni val.

Ongin hevði trúð tí.

Tí hvat skuldi endamálið verið við tí?

**Kann mistreysti útflytast?**
Eitt er, at so nógv orka verður brúkt her heima til at fortelja føroyingum, at vit nytta onki. At vit megna ikki at skapa eitt samhaldsfast og gott samfelag, uttan at danir hava yvirvaldið í landum. Og at vit tí ongantíð kunnu javnsetast við aðrar tjóðir.

Men tað er jú til tess at fáa atkvøður í breyðpolitikkinum. At ræða fólkið, fyri afturfyri at fáa pening úr Danmark at býta út.

Men hvat skuldi endamálið verið hjá einum føroyskum politikara at fortelja grønlendingum, at teir skulu ræðast frælsið og varðveita danskt yvirvald í Grønlandi?

Ongin kann fáa nakað burturúr at útflyta mistreysti til eitt annað fólk.

**Samstarv ella niðurgering**
Nú vilt tú kanska siga: Júmen, blanda tit tykkum ikki uppí í Grønlandi, tá tit samstarva um fullveldi?

Jú, víst kann tað eisini hava ávirkan, at vit samstarva um felags mál. Men tað byggir ikki á nakað misálit ella niðurgering av grønlendska fólkinum. Vit samstarva við grønlendskar politikarar um at berjast fyri tjóðarrættindum hjá bæði føroyingum og grønlendingum.

Vit hava sjálvsagt fult álit á, at grønlendingar velja sína egnu leið.

Vit tosa ikki niður til grønlendingar og ávara teir um at velja sítt egna frælsi ella at velja ávísar flokkar.

Ein himmalvíður munur er millum hetta, og so á sjálvum valdegnum at ávara grønlendingar ímóti at velja frælsisflokkar. Enntá í einum blað, sum er kent fyri at standa á sambandsvonginum.

Munur er á at samstarva um felags mál og so at mæla eini heilari tjóð til ikki at hava nakað mál.

Tað er meira enn sjálvt tann mest svarti sambandsmaðurin nakrantíð hevur gjørt.

Vónandi kemur hetta ikki út í øðrum londum, áðrenn tú hevur rættað mistakið, Jóannes.